# Kunngerðablaðið A

2025

Givið út 26. november 2025

Nr. 182 21. november 2025

**Kunngerð**
**um**
**áseting og javning av almannaveitingum fyri 2026**

Við heimild í § 6 í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting av almannaveitingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 4 frá 25. januar 2001, løgtingslóg nr. 113 frá 11. desember 2007, løgtingslóg nr. 139 frá 6. oktober 2011 og løgtingslóg nr. 118 frá 9. desember 2024, § 12, stk. 5 í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum broytt við løgtingslóg nr. 142 frá 20. desember 2012 og § 15, stk. 3 og § 47, stk. 4 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 27. mars 2025, verður ásett:

**§ 1.** Upphæddirnar sbrt. hesi kunngerð eru galdandi fyri 2026.

*Upphæddir sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.*

**§ 2.** Upphæddir sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., sum eru ásettar § 3, nr. 1 í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum, eru sum ásett í stk. 2-12.

*Stk. 2.* Fólkapensjón er árliga:
1) Grundupphædd til støk er kr. 57.096,00.
2) Viðbót til støk, fødd áðrenn 1. januar 1953 er kr. 51.648,00.
3) Viðbót til støk, fødd aftaná 31. desember 1952 er kr. 65.460,00.
4) Grundupphædd til gift er kr. 45.372,00.
5) Viðbót til gift, fødd áðrenn 1. januar 1953 er kr. 41.508,00.
6) Viðbót til gift, fødd aftaná 31. desember 1952 er kr. 48.456,00.

*Stk. 3.* Hægsta fyritíðarpensjón er árliga:
1) Grundupphædd til støk er kr. 82.596,00.
2) Viðbót til støk er kr. 70.956,00.
3) Grundupphædd til gift er kr. 65.604,00.
4) Viðbót til gift er kr. 65.964,00.

*Stk. 4.* Miðal fyritíðarpensjón er árliga:
1) Grundupphædd til støk er kr. 82.596,00.
2) Viðbót til støk er kr. 35.772,00.
3) Grundupphædd til gift er kr. 65.604,00.
4) Viðbót til gift er kr. 33.648,00.

*Stk. 5.* Lægsta fyritíðarpensjón er árliga:
1) Grundupphædd til støk er kr. 82.596,00.
2) Viðbót til støk er kr. 34.848,00.
3) Grundupphædd til gift er kr. 65.604,00.
4) Viðbót til gift er kr. 31.812,00.

*Stk. 6.* Avlamisveiting er árliga kr. 38.556,00.

*Stk. 7.* Avlamisviðbót er árliga kr. 38.556,00.

*Stk. 8.* Eyka viðbót er árliga kr. 38.892,00.

*Stk. 9.* Barnaviðbót er árliga kr. 14.844,00.

*Stk. 10.* Hjálparviðbót er árliga kr. 41.196,00.

*Stk. 11.* Røktarviðbót er árliga kr. 82.248,00.

*Stk. 12.* Frádráttarfrí inntøkuupphædd í fyritíðarpensjón er árliga kr. 106.000,00.

*Upphædd sbrt. løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar*

**§ 3.** Upphædd sbrt. løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar, sum er ásett í § 3, nr. 2 í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum, er árliga kr. 8.676,00.

*Upphæddir sbrt. løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.*

**§ 4.** Upphæddir sbrt. løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., sum eru ásettar í § 3, nr. 3 í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum, eru sum ásett í stk. 2-6.

*Stk. 2.* Barnagjald sbrt. § 3, nr. 3, rað 1 og 4 í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum, er árliga kr. 14.844,00.

*Stk. 3.* Økt barnagjald er árliga kr. 29.688,00.

*Stk. 4.* Barnaískoyti er kr. 2.851,00 um ársfjórðingin.

*Stk. 5.* Gjald í sambandi við føðing er ein eingangsupphædd á kr. 856,97.

*Stk. 6.* Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing er kr. 1.466,37 um mánaðin.

*Upphæddir sbrt. kunngerð um serlig bútilboð*

**§ 5.** Upphæddir sbrt. kunngerð um serlig bútilboð eru hesar.

*Stk. 2.* Egingjald fyri serligt bútilboð sbrt. § 7, stk. 2, 1. pkt. er mánaðarliga kr. 2.099,00.

*Stk. 3.* Egingjald fyri serligt bútilboð sbrt. § 7, stk. 3, 1. pkt. er mánaðarliga kr. 2.508,00.
*Stk. 4.* Fevnir gjaldið sbrt. § 7, stk. 2 og 3 eisini um kost, kann bútilboðið í mesta lagi krevja kr. 2.319,00 afturat ásetta egingjaldinum.

*Upphæddir sbrt. kunngerð um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur*

**§ 6.** Upphæddir sbrt. kunngerð um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur eru sum ásett í stk. 2-9.
*Stk. 2.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 1, 1. pkt. er kr. 7.480,00.
*Stk. 3.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 1, 2. pkt. er kr. 4.603,00.
*Stk. 4.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 2, 1. pkt. er kr. 4.603,00.
*Stk. 5.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 2, 2. pkt. er kr. 2.877,00.
*Stk. 6.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 3, 1. pkt. er kr. 2.877,00.
*Stk. 7.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 3, 2. pkt. er kr. 2.877,00.
*Stk. 8.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 4, 1. pkt. er kr. 7.480,00.
*Stk. 9.* Bústaðarútreiðslan sbrt. § 3, nr. 4, 2. pkt. er kr. 4.603,00.

*Upphædd sbrt. løgtingslóg um almannatrygd og tænastur*

**§ 7.** Hægsta uppihaldsveiting sbrt.§ 12 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er 21.172,00 kr. um mánaðin.

*Upphædd sbrt. løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk*

**§ 8.** Hægsta uppihaldsveiting sbrt. § 12 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk er 21.172,00 kr. um mánaðin.

*Gildiskoma og virknaður*

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi fyri útgjald av veitingum frá og við januar mánað 2026.

Almanna- og mentamálaráðið, 21. november 2025

**Eirikur í Jákupsstovu (sign.)**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)